## Forsætisráðharri á røktarheim

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin Anker Jørgensen er nú farin á røktarheim í Keypmannahavn. Anker Jørgensen hevur í 45 ár búð í Sydhavnen í Keypmannahavn, men nú skal hann búgva á røktarheimi á Vesterbro. - Eg kláraði ikki at ganga trappurnar upp á triðju hædd longur, sigur Anker Jørgensen við Ekstrablaðið.Hann letur væl at umstøðunum á røktarheiminum. - Her er sjálvandi nakað minni, men samanborið við, tað sum eg hevði væntað mær, so er tað væl innrættað her. Tíverri havi eg ikki pláss fyri øllum mínum bókum og myndum, sigur Anker Jørgensen við blaðið. Á myndini sæst Anker Jørgensen uttan fyri Norðurlandahúsið í 2002 saman við fyrsta ráðharrabili sínum, sum endaði sínar dagar í Føroyum.



## Hallið var 289 milliónir

Hallið í nýggja fíggjarlógaruppskotinum frá landsstýrinum er 286 milliónir krónur. Í gjár var landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, á fundi við Fíggjarnevndina hjá løgtinginum, og við sær hevði hann nýggja uppskotið um fíggjarlóg. Í næstu viku skal Jóannes Eidesgaard lata Fíggjarnevndini eitt meira nágreiniligt uppskot, men tølini verða tey somu, sum vórðu løgd fyri Fíggjarnevndina í gjár. Anfinn Kallsberg, formaður í Fíggjarnevndini, sigur, at nú fer nevndin undir at gera eitt álit at leggja fyri løgtingið. Hann roknar við, at tað gongur ein lítil mánaði, áðrenn álitið frá Fíggjarnevndini verður liðugt.

# fiskaskræðu á Eiði



*Eyðun Gaardbo, stjóri í Seanergy, heldur røðu, og aftanfyri hann høggumegin stendur nevndarformaðurin í felagnum, spaniumaðurin Michael Junga*



*Eyðun Gaardbo, stjóri og Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum*



*Egil Olsen og borgarstjórin á Eiði í fleiri ár, Thordur Niclasen. Tordur bar eisini stigtakarunum eina heilsu*

allar tær royndir, sum brúk er fyri, og tað merkir, at fyritøkan á Eiði hevur allar møguleikar at sleppa undan nógvum barnasjúkum.

- Teir kenna hesa framleiðslu gjøgnum hesi mongu ár, og teir eru inni á marknaðinum. Tað er okkara fyrimunur, nú vit fara í gongd her norðuri, leggur stjórin aftrat.

### Vælegnað virki

Nevndarformaðurin í Seanergy, spaniumaðurin Michael Junka, sigur seg síggja nógvar møguleikar í samstarvinum við fyritøkuna á Eiði.

Hann sigur, at spanska fyritøkan hevur verið væl nøgd við samstarvið við føroyingar, sum vísir seg at rigga sera væl.

- Fyritøkan á Eiði hevur eisini eina hóskandi støðd til slíka framleiðslu. Eg haldi, at møguleikarnir til hesa framleiðslu úr fiskaskræðu sum heild eru góðir í Føroyum. Nógv og gott vatn er neyðugt í framleiðsluni, og hetta er nógv mikið til av á Eiði.

Michael Junka sigur, at nú verður bara bíðað í spenningi eftir, at framleiðslan úr fiskaskræðu kemur í gongd.

### Skjót úrslit

Stjórin, Eyðun Gaardbo, er bjartskygdur og væntar, at úrslit fara at síggjast heilt skjótt.

- Vit miðja eftir at hava avlop í rakstrinum av framleiðsluni longu í komandi ári. Nú royndarkoyra vit, og síðan verður pulvurið sent úr á marknaðin. Fyrr enn vit veruliga eru komnir út á marknaðin við okkara vøru, kunnu vit ikki siga, hvussu stórur eftirspurningurin er, men framleiðslan á Eiði verður so tillagað eftir eftirspurninginum, leggur hann aftrat.

Tað er ikki at taka seg aftur í, at nýggja virksemið á Eiði er eitt frambrot, sum hevur vakt stóran áhuga millum vinnulívsfólk og myndugleikar í Føroyum.

### Egil umrøddur

Pionerurin Egil Olsen fekk við móttøkuna á Eiði nógv rós fyri sítt hugskot og sítt dirvi at taka upp samstarv við sponsku stórfyritøkuna á hesum øki.

- Vit hava góðar vónir um hesa framleiðslu, og vit eru sera spentir eftir at koma í gongd, sigur stjórin, Eyðun Gaardbo.



*Eyðun Gaardbo, stjóri í Seanergy og Egil Olsen, sum eigur upprunaliga hugskotið aftanfyri verkætlanina*